# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Alexander Litvinenko var ein svíkjari og skuldi verið revsaður fyri fleiri árum síðani* (*fyrrverandi FSB-leiðari*).

# Semjan gevur vón um frið

**Semjan millum Fatah og Hamas um at skipa eina savningarstjórn kann rudda slóð fyri friði í teimum palestinsku økjunum.**



*Palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, og leiðarin í Hamas, Khaled Meshal, undir samráðingunum í Mekka í gjár.*

Nógvar rakettir fóru upp í loft á Gaza og á Vestara áarbakka í gjárkvøldið, men hesaferð skutu fólk gamlar nýggjársrakettir, sum fagnaðu semjuni, sum leiðararnir í Fatah og Hamas samdust um í Mekka seinnapartin. Fólk søgdu seg vænta frið, eftir at samanbrestir millum Fatah og Hamas hava kostað næstan 100 mannalív teir báðar seinastu mánaðarnar.

-Vit eru samdir um at skipa eina savningarstjórn, segði palestinski sendiharrin í Saudiarabia, Jamal al-Shobaki, tá semjan var undirskrivað um sjeytíðina í gjárkvøldið.

Sjálvt innihaldið í semjuni bleiv ikki almannakunngjørt, og tað er framvegis ógreitt, hvat semjan sigur um viðurskiftini við Ísrael. Hinvegin er greitt, at júst spurningurin, hvørja støðu ein palestinsk stjórn skal hava mótvegis Ísrael, var ein av teimum truplastu spurningunum í samráðingunum. Ísrael og Vesturheimurin hava kravt, at palestinska stjórnin skal viðurkenna ísraelska ríkið, men higartil hevur Hamas sýtt fyri tí.

Vesturlendskir eygleiðarar søgdu í gjárkvøldið, at skal semjan fáa undirtøku millum palestinska fólkið, er tað ein treyt, at palestinar fáa teir pengar og ta hjálp, sum Ísrael og Vesturheimurin hava sýtt fyri at lata, fyrr enn Hamas viðurkennir Ísrael.

Sambært Reuters hevur palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, biðið saudiarabisku stjórnina gera sína ávirkan galdandi í Washington fyri at sleppa burtur úr teimum búskaparligu tiltøkunum. Afturfyri skal Abbas hava lovað, at ein komandi savningarstjórn er til reiðar at lúka tær treytir, sum Vesturheimurin hevur sett. Vesturlendsku eygleiðararnir siga, at kann Abbas halda tað lyftið, er tað einki minni enn ein stórhending.

### Ísrael

Spurningurin er so, hvat Ísrael sigur. Tzpi Livni, uttanríkisráðharri, segði í gjár, at skal Ísrael viðurkenna eina komandi palestinska stjórn, skal hon tryggja frið og viðurkenna Ísrael, men eygleiðarar ivast í, um Ísrael yvirhøvur er sinnað at viðurkenna eina stjórn, sum Hamas er partur av.

Diplomatar í Saudiarabia siga, at samráðingarnar í Mekka vóru tann seinasti møguleikin at fáa enda á bardøgunum í Gaza og ósemjuni millum Fatah og Hamas, og at ein slík semja er treyt fyri, at tiltøkini ímóti palestinsku myndugleikunum kunnu verða sett úr gildi.

Ber semjan á mál, eru útlitini til, at okkurt kann spyrjast burtur úr fundinum 19. februar, tá Mahmoud Abbas og ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, skulu hitta amerikanska uttanríkisráðharran, Condoleezza Rice. Hon hevur í hvussu er sett sær fyri at fáa friðartilgongdina aftur á beina kós.

# Hann var ein svíkjari

**Alexander Gusak, sum var leiðari hjá KGB-agentinum Alexander Litvinenko, sum doyði av eitran í London í november, hevur lítið gott at bera sínum fyrrverandi agenti. Í samrøðu við bretska blaðið The Times sigur Gusak, at Litvinenko hjálpti bretsku fregnartænastuni at avdúka russiskar agentar í Bretlandi, og tað gjørdi, at summir av teimum russisku agentunum hóttu við at beina fyri honum.**



-Í mínum eygum var hann ein svíkjari, tí hann avdúkaði tað, sum ein loyniligur agentur ongantíð má avdúka - sínar keldur, sigur Alexander Gusak.

Gusak var ovasti í teirri deildini hjá loyniligu løgregluni FSB, sum skuldi avdúka skipaðan kriminalitet. Hann fór úr FSB í 1998. Sama árið avdúkaði Litvinenko, at FSB hevði lagt ætlanir um at beina fyri russiska ríkmanninum Boris Berezovsky.

Alexander Gusak hevur fyrr sagt, at tað vóru kanska kekenar, sum beindu fyri Alexander Litvinenko. Eitt skifti vóru teir báðir í Dagestan, har teir avdúkaðu kekenskar uppreistrarmenn, og Gusak hevur sagt einum russiskum blaði, at ein uppreistrarmaður doyði, meðan hann var til avhoyringar hjá FSB. Sambært Gusak er tað ikki óhugsandi, at tað var Litvinenko, sum hevði avhoyrt uppreistrarmannin.

# Øði um útgrevstur

Fleiri arabisk lond eru í øðini, eftir at ísraelsku myndugleikarnir eru farnir undir at gera eina gongubrúgv tætt við Tempulhæddina í Jerusalem, tí tey bera ótta fyri, at arbeiðið fer at oyðileggja al-Aqsa moskuna, sum er á Tempulhæddini. Málið verður hildið vera so álvarssamt, at Saudiarabia hevur lagt tað fyri arabisku samgonguna, sum fer at umrøða tað í næstu viku. Samstundis hevur saudiarabiska stjórnin biðið altjóða samfelagið leggja trýst á ísraelsku stjórnina fyri at fáa hana at sleppa ætlanini. Higartil hevur Ísrael ikki latið atfinningarnar við seg koma.

**STUTT SAGT**

## Lagdur undir morð - funnin deyður

Tann 48 ára gamli Gareth Huw Roberts bleiv av misgáum settur í samband við kvinnumorðini í Ipswich. Nú er hann funnin deyður.

Tá blaðið Daily Mail skuldi prenta eina mynd av Steve Wright, sum løgreglan setti í samband við tey nógvu kvinnumorðini í enska býnum Ipswich, prentaði blaðið av misgáum skeiva mynd. Maðurin, sum kom at standa á forsíðuni á blaðnum, æt ikki Steve Wright , men Gareth Huw Roberts.

Sambært The Independent høvdu Wright og Roberts verið vinmenn, og Daily Mail játtaði alt fyri eitt at rinda Roberts endurgjald fyri mistakið. Harafturat prentaði blaðið eina umbering.

Týsdagin varð Gareth Huw Roberts funnin deyður í íbúð síni í býnum Pwlhelli í Wales. Løgreglan vil ikki siga, hvørjum hann doyði av.